# Gott ískoyti til krabbameinsgranskingina

**Dysturin og innsavningin hjá hondbóltsfelagnum Stjørnini til frama fyri »Stuðla bróstunum« góvu næstan 60.000 krónur**

Randi Jacobsen



*Annika Karlsdóttir Ljósstein er meira enn væl nøgd við stuðulstiltakið, sum liðfelagar hennara í Stjørnuni tóku stig til*

*Mynd: Dávur Winther*

Spælararnir í hondbóltsfelagnum Stjørnuni eru púra ovfarnir av tí undirtøkuni, sum innsavning teirra til frama fyri "Stuðla bróstunum". Øll atgongumerkjasølan til dystin móti Kyndli fór til innsavningina, og fleiri fólk og fyritøkur fluttu tiltakinum pening.

Tá ið innsavningin steðgaði mánadagin, vóru komnar inn 59.449 krónur. Tá er talt við sølan av armbondum fyri samanlagt 5.000 krónur.

Peningurin fer óskerdur til granskingina av bróstkrabba.

– Vit eru allar fegnar um at kunna stuðla granskingini, sigur Annika Karlsdóttir Ljósstein, sum var orsøkin til, at Stjørnan valdi at hava dystin sum stuðulstiltak.

Hon fekk nevniliga í summar staðfest bróstkrabba, og liðfelagar henna funnu tí upp á at stuðla henni og granskingini á henda hátt.

Jákup N. Olsen, formaður í Krabbameinsfelagnum er ikki bra fegin um at fáa so nógvan pening til granskingina. Hetta var eisini ein frálíkur máti at varpa ljós á bróstkrabba, áskoðararnir vóru nógvir, og tiltakið fekk nógva umrøðu.

Krabbameinsfelagið ætlar at hava eina almenna móttøku av peningagávuni, og tá verður greitt frá granskingini í Føroyum av bróstkrabba.

Peningurin frá Stjørnuni kemur væl við, sigur Jákup N. Olsen.

Granskingin, sum er ein verkætlan yvir trý ár kostar 2-3 mió. krónur.



# Porkeri fær nýggjan kirkjugarð

**Um ein mánað ella so verður farið at gera nýggjan kirkjugarð á Bakkafløtti í Porkeri. Tað er í tøkum tíma, tí bara fýra dupultpláss eru eftir**

Randi Jacobsen

*Í fleiri bygdum verður bíðað til næstan av seint við at gera nýggjan kirkjugarð, tá ið gamlia garðurin er við at fyllast.*

Ein av hesum bygdum er Porkeri. Har hevur kommunustýrið í fleiri ár tosað um at fara í gongd, men ikki fyrr enn nú hendir nakað.

Fyri fýra árum síðan var ætlanin at víðka verandi kirkjugarð suðureftir, men tann ætlanin varð slept.

Næsta ætlanin var at gera kirkjugarð á einum øki, sum kommunan keypti, men tann ætlanin varð eisini slept. Kommunustýrið helt ikki staðið vera tað rætta, og so var har eisini so veðurringt.

Nýggjasta ætlanin er at gera nýggjan kirkjugarð norðan fyri verandi kirkjugarð. Tað økið hevur kommunan ognað sær við makaskifti.

Fyri at gera kirkjugarðin á Bakkafløtti í Porkeri, var neyðugt at broyta byggisamtyktina. Broytingin skal gókennast av landsstýrinum.

Mikkjal Sørensen, borgarstjóri í Porkeri sigur, at so skjótt sum broytingin í byggisamtyktini er komin, byrjar arbeiðið. Økið skuldi verið skjótt at planera. Tað er góð velt mold, og ikki verður neyðugt at spreingja.

Mikkjal Sørensen er so nýggjur borgarstjóri, at hann ikki dugir at siga, hví nýggjur kirkjugarður er gjørdur fyrr.

– Tað hevur rættiligan skund at fáa nýggjan kirkjugarð, tí bara eini fýra dupultpláss eru eftir. Fleiri einkultpláss eru tó, sigur Mikkjal Sørensen.

Nýggi kirkjugarðurin verður 3000 fermetrar og skuldi tryggjað øllum porkeningum gravpláss 50-80 ár fram.

Í Porkeri búgva umleið 330 fólk búgva í Porkeri. Í fjør vísti ein uppteljing, at fimtan prosent vóru yvir 67 ár.

# Grivin sum ríkismaður

**Umboð fyri øll Norðurlond eru í dag í Nuuk og fylgja fyrrverandi landsstýrisformanninum Jonathan Motzfeldt. Úr Føroyum eru farnir Jørgen Niclasen vegna landsstýrið og Henrik Old vegna Javnaðarflokkin**



Randi Jacobsen

Klokkan eitt í dag grønlendska tíð fór Jonathan Motzfeldt, fyrrverandi landstings- og landsstýrisformaður og ein av grundarunum av grønlendska heimastýrislógini til gravar.

Tað var ein ikki heilt vanlig jarðarferð, tí umboð fyri øll Norðurlond vóru og fylgdu, fleiri umboð fyri almenna Grønland og somuleiðis danski krúnprinsurin Frederik.

Úr Føroyum eru farnir Jørgen Niclasen vegna Føroya Landstýri og Henrik Old, fyrrverandi tingmaður Javnaðarfloksins. Henrik Old fylgir vegna Javnaðarflokkin. Hann kendi væl Jonaøthan Motzfeldt gjøgnum Norðurlandaráðið.

Vegna donsku stjórnini fylgdu mentanarmálaráðharrin og fyrrverandi uttanríkisráðharrin Per Stig Møller, og vegna donsku sosialdemokratarnar Mogens Lykketoft, fyrrverandi uttanríkisráðharri. Mogens Lykketoft og Jonathan Motzfeldt vóru góðir vinir, og Motzfeldt prestur vígdi Mogens Lykketoft og konuna Mette Holm í eini bygd í Grønlandi.

Jonathan Motzfeldt fór til gravar úr Hans Egede kirkjuni, sum rúmar 450 fólkum. Av teimum vóru 200 sett av til familjuna, fyrrverandi og núverandi limir í landsstýrinum og landstinginum, borgarstjórar og umboð fyri Norðurlond og Nunavut, bróðurfólkið hjá grønlendingum í Kanada.

Grønlendska kringvarpið sendi frá jarðarferðini, og samstundis sum jarðarferðin var í Nuuk, var minningarhald yvir Jonathan Motzfeldt í Helligåndskirkjuni í Keypmannahavn.

Tey avvarðandi bóðu um, at fólk, sum vildu minnast Jonathan Motzfeldt í staðin fyri blómur og kransar, sendu pengar til Jonathan Motzfeldt grunnin, ið letur stuðul til vælgerandi endamál í Grønlandi.

Í sambandi við jarðarferðina gav grønlendska blaðið AG út serblað um Jonathan Motzfeldt, lív og avrik hansara.

Jonathan Motzfeldt var 72 ára gamal, nú hann doyði.

*Set greinina tvørturum niðast á síðuni*